# VB hevur havt takið á Skála

**Men vágbingar, sum í morgin hava heimavøll á Sevmýri, hava skrivað sær aftanfyri oyrað, at Skála gjørdi av við meistararnar**

VB–SKÁLA
*Jóannes Hansen*

Tað verður forkunnug vitjan á Tvøroyri í morgin. Fyri fyrstu og ivaleyst einastu ferð í ár verður landskappingardystur í bestu deildini á Sevmýri. Tað eru vágbingar, sum eiga heimavøllin. Gamla graslíkið er tikið av vøllinum á Vágseiði. Nýggja undirlagið rokna teir við verður lagt á í næstu viku, tá ið týskararnir koma suður, eftir at teir nú eru lidnir á Toftum.

Vágbingar eru væl kunnaðir um, at Skála megnaði at gera av við HB í fyrsta umfarinum. Hesi trý liðini – VB, Skála og HB – vóru í sama bólki í steypakappingini. VB vann 4–0 og tapti 6–0 ímóti HB, og VB vann báðar uppgerðirnar ímóti Skála. Á Skála var úrslitið 6–3 til VB, og á Sevmýri vann VB 4–0. HB vann tvær ferðir við einum máli ímóti Skála. Út frá hesum staðfesta teir í Vági, at tað skal ikki leggjast so nógv í úrslitini, og at talan verður um heilt nýggja avbjóðing í morgin.

Allir VB spælararnir vóru tøkir undan venjingini í gjárkvøldið.

## Vongskerdir

Á Skála siga teir seg hava bæði beinini á jørðini, og tað halda teir seg hava orsøk til, sjálvt um teir vunnu trý stig ímóti HB. Í tí dystinum vóru vongverjarnir báðir, Bárður Danielsen og Iulian Florescu, rættuliga eyðsýndir, men tað er ikki so víst, at teir fara at fáa møguleikan at endurtaka avrikið í morgin.

– Hvørgin teirra hevur vant í hesi vikuni. Iulian hevur trupulleikar í rygginum, og Bárður hevur trupulleikar í lærkrikanum. Tað er rættuliga ivasamt, um teir verða tøkir í morgin, men vit vóna tað besta, verður sagt av Skála, har teir ikki fjala yvir, at tað hevði verið eitt gott úrslit, um teir høvdu fingið eitt stig við til hús aftur. Skála hevur spælt tvær ferðir spælt landskappingardyst á Vágseiði. Í fjør vann VB 2–0, og í fyrraárið endaði tað málleyst.

# B68 og GÍ aftur á nýggjum vølli

**Hátíðarhald verður á Svangaskarði, tá ið tað fyri fyrstu ferð fer at verða spælt á nýggja graslíkinum**

B68–GÍ
*Jóannes Hansen*

Nýtt graslíkið er lagt á Svangaskarð, har gøtumenn í morgin fara at vitja B68. GÍ vitjaði B68 í síðsta dystinum, áðrenn gamla graslíkið varð tikið av. Tað var í bólkaumfarinum í steypakappingini. GÍ vann bæði í Gøtu og á Toftum við einum máli. Hetta at B68 og GÍ eru fyrstu feløgini, sum spæla á nýggjum graslíki er einki nýtt. Tá ið graslíkið í Gøtu varð tikið í nýtslu í fyrraárið, vóru tað hesi bæði feløgini, sum spældu.

Í morgin fer samansetta kvinnuliðið B68/GÍ at spæla klokkan 12.15 ímóti FS Vágum. Undan 1. deildardystinum á mannfólkasíðuni fer hornorkestrið at spæla. Marjun Gaardbo, bygdaráðsformaður í Nes kommunu, fer at siga nøkur orð, og Símun Johannesen, formaður í mentunarnevndini í Nes kommunu, fer at geva bóltin upp. Eftir dystarlok fer Símun at handa vinnandi partinum steyp, sum Nes kommunu hevur latið B68 og GÍ at kappast um í morgin.

Tær seinastu ferðirnar hevur tað roynst hampuliga væl hjá B68, tá ið GÍ hevur vitjað. GÍ hevur ikki vunnið á Svangaskarði síðani 2000. Í 2001 og í 2002 var javnt, og í fjør vann B68 fyri fyrstu ferð á GÍ á heimavølli síðani 1989, tá ið úrslitið var 1–0. Í fjør var úrslitið 3–2 til B68.

GÍ hevur verið partur av bestu deildini síðani 1980, og B68 hevur verið í 1. deild síðani 1981. Samantalda úrslitið í teimum 23 landskappingardystunum, sum tey higartil hava spælt á Svangaskarði, er tað, at GÍ hevur vunnið tólv ferðir, sjey ferðir hevur verið javnt, og B68 hevur á Svangaskarði bast gøtumonnum fýra ferðir. Málmunurin er 28–58!

Hjá GÍ er stór kapping um plássini. Afturat øllum teimum, sum kappaðust síðsta vikuskifti, er Poul Henning Jacobsen komin afturat. Hann var leikbannaður ímóti ÍF. Vitus Kofoed hevur nú vant saman við nýggju liðfeløgunum, og tað kann roknast við, at hann í morgin fer at fáa møguleikan ímillum teir fyrstu ellivu.

Á Toftum er sama fólkið tókt, sum sunnudagin legði rygg til 1–0 tap í Klaksvík. Afturat teimum er Jákup Eli Olsen komin. Tað sigur seg sjálvt, at tað er ávíst trýst á toftamonnum, sum tað fer at kennast eitt sindur keðiligt hjá, um teir næstu ferð skulu út at ferðast við ongum á kontini.

# Longu nú liggur ávíst trýst á

**Hjá bæði NSÍ og ÍF hevur tað stóran týdning at fáa góða úrtøku burturúr oyggjauppgerðini í Fuglafirði**

ÍF–NSÍ
*Jóannes Hansen*

Fyri fyrstu ferð í næstan fimm ár verður 1. deildar fótbóltur í landskappingini í Fuglafirði í morgin. Hesar næstu dagarnar fara ÍF viðhaldsfólkini rættuliga at kenna smakkin av, at teir nú aftur eru har, sum tað gongur fyri seg. Leygardagin verður tað aftur álvari, tí tá skal ÍF á heimavølli spæla fjórðingsfinalu í steypakappingini ímóti KÍ.

Tá ið ÍF í 1999 segði farvæl við bestu deildina, var støðan einki serlig. Í 17. umfarinum spældu teir síðstu ferðina á heimavølli, og tá taptu teir 5–1 ímóti GÍ. Hóast ÍF sunnudagin tapti tepurt á útivølli ímóti GÍ, so er fótbóltslagið í Fuglafirði framvegis gott. Venjarin hjá teimum, Sigfríður Clementsen, vísti fyrr í vikuni á, hvussu týdningarmikið tað er ikki at verða liðið, sum vísir hampuliga gott fótbóltsspæl, men sum ikki vinnur.

Tað er sjálvsagt, at mest upplagda høvið at fáa stig og vinna sigrar hjá ÍF er á heimavøllinum í Fuglafirði. Har fer NSÍ at vitja í morgin. Í 1999 endaðu báðir dystirnir millum tey bæði Eysturoyar feløgini javn. 0–0 í Runavík í fyrsta umfarinum og 1–1 í 10. umfarinum í Fuglafirði.

Hóast kappingin bara er eitt umfar gomul, so er NSÍ undir ávísum trýsti, tá ið teir fara til Fuglafirðar. Venjarin hjá teimum staðfesti eftir 1–1 á heimavølli ímóti VB, at tað var ikki nóg gott ikki at fáa fult í sovornum uppgerðum. Tað fer at kennast eyka meint, um teir einki fáa burturúr í morgin, og tað hevði verið sera kærkomið, um teir høvdu megnað at fingið øll stigini.

Hjá ÍF er sama fólkið tókt, sum spældi í Gøtu sunnudagin. Magni á Lakjuni noyddist út, tí hann hevði trupulleikar við fótliðnum. Hann vandi ikki mitt í vikuni, men tað varð roknað við, at hann skuldi venja aftur í gjárkvøldið, og teir ivast ikki í, at hann fer at spæla í morgin.

Undan síðsta vikuskifti varð roknað við, at Ian Højgaard skuldi vera á NSÍ miðvøllinum ímóti VB. Tað var hann ikki. Spæliloyvið var ikki komið úr Vejle. Nú er hetta komið upp á pláss, og Ian verður í morgin við í kappingini um miðvallarplássini. Aleksandar Jovevic átti eisini at verið ein av nógvum, sum kappast um plássini á NSÍ miðvøllinum. Hann var ikki við ímóti VB orsaka av vøddaskaða, og hóast tað hevur gingið rætta vegin hjá honum, so er hann neyvan í nóg góðari venjing at spæla.

# Fleiri veteranar sita uttanfyri

**John Petersen verður millum B36 spælararnar, meðan fleiri av hinum royndu B36 monnunum framvegis ikki eru førir fyri at spæla. Tað sama er galdandi fyri Allan Joensen hjá KÍ, sum nú skal til Danmarkar**

B36–KÍ
*Jóannes Hansen*

Eftir ikki serliga sannførandi 1. hálvleik og kortini stórsigur á EB/Streymi í fyrsta umfarinum, eigur B36 aftur heimavøll í øðrum umfari. Gestirnir úr Klaksvík fingu fulla úrtøku á heimavølli ímóti B68. Men heldur ikki hjá teimum segðist leikliga avrikið at vera so ógvuliga sannførandi.

B36 og KÍ vóru saman í bólkaumfarinum. Í síðsta umfarinum endaði tað 1–1 í Gundadali. Hjá KÍ var talan um nógv meiri sannførandi avrik, enn tey vóru ímóti B36 í fjør. Tá løgdu klaksvíkingar rygg til fleiri eyðmýkjandi tap ímóti B36. Eitt nú taptu teir landskappingardystin í Gundadali 7–1.

Hjá B36 er tað komið væl við, at teir hava nógv fólk at taka av. Fleiri veteranar havva verið skaddir, og tað tykist sum um, at tað verður ein løta, áðrenn fleiri teirra fara at vera við í kappingini um plássini. John Petersen hevur vant seinnapartin av vikuni. Fyrrapartin í gjár tóktist tað sum um, at hann verður partur av B36 liðnum í morgin. Um hann verður førur fyri at spæla alla tíðina var ógreitt.

Jóhannis Joensen, Allan Mørkøre og Jens Kristian Hansen eru framvegis skaddir. Teir eru ikki farnir at venja saman við hinum. Ímóti EB/Streymi varð veteranurin Jens Erik Rasmussen tikin út, tá ið seinna umfarið var hálvrunnið. Tá varð Áki Mørk settur á vøllin. Hóast hann bara hevði vant í fjúrtan dagar, so var Áki rættuliga væl upplagdur, og hann skoraði tvey mál. Tað kann væl vera, at hann í morgin verður ímillum teir fyrstu ellivu.

Hjá KÍ er tað greitt, at Jacob Bymar, sum skoraði sigursmálið ímóti B68, ikki verður við í morgin. Orsaka av vøddaskaða noyddist hann at taka seg burturúr ímóti B68. Tað er ivasamt, um hann verður førur fyri at spæla fjórðingsfinalu ímóti ÍF um eina viku. Norski álopsspælarin, Stig Edvin Aksnes, hevur verið uttanfyri. Fyrst tí hann var skaddur og so tí hann ikki slapp framat fyri Jacob Bymar og Erlingi Fles. Í morgin fer hann ivaleyst at fáa møguleikan at vísa, at hann eigur rætt til eitt av álopsplássunum. Miðvallarin Símun Joensen er eitt sindur ivasamur. Hann hevur trupulleikar við fótinum og hevur ikki vant við fullari ferð í hesi vikuni.

Í Klaksvík hava teir vónað, at veteranurin og liðformaðurin seinastu árini, Allan Joensen, var við at koma fyri seg aftur. Tað vóna teir framvegis, men nú er greitt, at tað neyvan verður hesumegin summarsteðgin. Norðlýsið visti í gjár at siga, at Allan nú skal til kanningar og skanningar í Århus. KÍ venjarin, Ove Flindt–Bjerg, hevur umvegis gamla felagið hjá sær, AaB, fingið samband við serlæknan Ulrik Fredberg, sum skal finna út av, hvussu støðan er, og hvat møguliga kann gerast við hælsinuna, sum síðani í 1996 hevur verið orsøk til, at Allan Joensen so at siga ikki hevur verið førur fyri at spæla við fullari ferð.

**Lesið meira á s. 51**






Glasstovan søkir eftir einum kokkalærlingi at byrja skjótast tilber.

**Útbúgvingin**
Vit bjóða tær eina útbúgving, ið tekur 4 ár. Lærutíðin umfatar starvsvenjing í Glasstovuni á Hotel Føroyum og skúlagongd á tekniskum skúla í Danmark.

Tú kemur at starvast saman við einum ungum liði í einum umhvørvi har tað hendir nakað. Sum lærlingur í einum altjóða hotelli fært tú nógvar avbjóðingar.

**Tann rætti lærlingurin**
Hevur tú áhuga fyri ferða - og tænastuvinnuni, umframt matgerð á hægri støði, hevur tú nú møguleikan fyri einum læruplássi.
Vit vænta, at tú ert ágrýtin, fyrikomandi og løtt/lættur av lyndi.

**Vit bjóða**
Verður tú kokkalærlingur á Hotel Føroyum, lova vit tær eina fjøltáttaða útbúgving og hollar royndir, sum tú kanst brúka víðari á tíni ferð gjøgnum lívið.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til høvuðskokkin Gunndur Fossdal á 31 75 00.

Umsóknir skulu sendast til:

*Hotel Føroyar P/F*
*Postsmoga 3303*
*110 Tórshavn*

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 17. mei 2004

GLASSTOVAN
The Favourite Restaurant

*Glasstovan er matstovan á Hotel Føroyum. Hotel Føroyar er eitt altjóða hotel við 4 stjørnum, sum verður rikið sum sjálvstøðugt partafelag í Smyril Line samtakinum. Hotellið er tað størsta í Føroyum við 216 seingjarplássum. Alt árið er Hotel Føroyar ein miðdepil fyri fundar- og skeiðvirksemi, eitt hotel fyri handilsfólk og ítróttarfólk. Um summarið virkar hotellið eisini sum frítíðarhotel. Í løtuni starvast 50 fólk á Hotel Føroyum.*

petur & petur • 320870




Glasstovan søkir eftir einum tænaralærlingi at byrja skjótast tilber.

**Útbúgvingin**
Vit bjóða tær eina útbúgving, ið tekur 3 ár og 4 mánaðir. Lærutíðin umfatar starvsvenjing í Glasstovuni á Hotel Føroyum og skúlagongd á tekniskum skúla í Danmark.

Tú kemur at starvast saman við einum ungum liði í einum umhvørvi, har tað hendir nakað. Sum lærlingur í einum altjóða hotelli, fært tú nógvar avbjóðingar.

**Tann rætti lærlingurin**
Hevur tú áhuga fyri ferða - og tænastuvinnuni, hevur tú nú møguleikan fyri einum læruplássi.
Vit vænta, at tú ert smílandi, ágrýtin, fyrikomandi og løtt/lættur av lyndi.

**Vit bjóða**
Verður tú tænaralærlingur á Hotel Føroyum, lova vit tær eina fjøltáttaða útbúgving og hollar royndir, sum tú kanst brúka víðari á tíni ferð gjøgnum lívið.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Tummas Láadal, yvirtænara á 31 75 00.

Umsóknir skulu sendast til:

*Hotel Føroyar P/F*
*Postsmoga 3303*
*110 Tórshavn*

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 17. mei 2004

GLASSTOVAN
The Favourite Restaurant

*Glasstovan er matstovan á Hotel Føroyum. Hotel Føroyar er eitt altjóða hotel við 4 stjørnum, sum verður rikið sum sjálvstøðugt partafelag í Smyril Line samtakinum. Hotellið er tað størsta í Føroyum við 216 seingjarplássum. Alt árið er Hotel Føroyar ein miðdepil fyri fundar- og skeiðvirksemi, eitt hotel fyri handilsfólk og ítróttarfólk. Um summarið virkar hotellið eisini sum frítíðarhotel. Í løtuni starvast 50 fólk á Hotel Føroyum.*

petur & petur • 320870




Hotel Føroyar søkir eftir gongsgentum til summarhálvuna at byrja skjótast tilber.

**Starvið**
Talan er um eitt reingerðarstarv við tilvísing til hirjuna.

Starvið umfatar ma. reingerð og klárgerð av kømurum, fundarhølum, matstovu, barrum, vm.

**Umsøkjarin**
• Er reinfør/ur
• Er álítandi og fyrikomandi
• Hevur góð samstarvsevni

**Vit bjóða**
• Løn smb. fakfelagssáttmála
• Fjølbroytt arbeiðsumhvørvi og -uppgávur
• Gott samanhald

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Sunnovu Justinussen, hirja á 317500

Umsóknir skulu sendast til:

*Hotel Føroyar P/F*
*Postsmoga 3303*
*110 Tórshavn*

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 8. mei 2004

Hotel Føroyar ★★★★

*Hotel Føroyar er eitt altjóða hotel við 4 stjørnum, sum verður rikið sum sjálvstøðugt partafelag í Smyril Line samtakinum. Hotellið er tað størsta í Føroyum við 216 seingjarplássum. Alt árið er Hotel Føroyar ein miðdepil fyri fundar- og skeiðvirksemi, eitt hotel fyri handilsfólk og ítróttarfólk. Um summarið virkar hotellið eisini sum frítíðarhotel. Í løtuni starvast 50 fólk á Hotel Føroyum.*

petur & petur • 320870




Hotel Føroyar søkir eftir náttarvørði til móttøkuna at byrja skjótast tilber.

**Starvið**
Talan er um eitt sjálvstøðugt starv, við tilvísing til móttøkuleiðaran.

Starvið umfatar m.a. eina professionella kundatænastu, inn- og útskriving av gestum, telefonavgreiðslu, sølu av kioskvørum og aðrar viðkomandi uppgávur.

**Umsøkjarin**
• Er álítandi og fyrikomandi
• Hevur góð samstarvsevni
• Hevur kunnleika til enskt og KT

**Vit bjóða**
• Eitt sjálvstøðugt og spennandi starv
• Eitt dynamiskt arbeiðspláss
• Gott samanhald

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Unn Hilduberg, móttøkuleiðara á 317500.

Umsóknir skulu sendast til:

*Hotel Føroyar P/F*
*Postsmoga 3303*
*110 Tórshavn*

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 8. mei 2004

Hotel Føroyar ★★★★

*Hotel Føroyar er eitt altjóða hotel við 4 stjørnum, sum verður rikið sum sjálvstøðugt partafelag í Smyril Line samtakinum. Hotellið er tað størsta í Føroyum við 216 seingjarplássum. Alt árið er Hotel Føroyar ein miðdepil fyri fundar- og skeiðvirksemi, eitt hotel fyri handilsfólk og ítróttarfólk. Um summarið virkar hotellið eisini sum frítíðarhotel. Í løtuni starvast 50 fólk á Hotel Føroyum.*

petur & petur • 320870